

NORÐOYA SPARIKASSI

ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Saltangará:
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. 475000
Fax 476012

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009



# UM SPARIKASSAN

Sparikassin
er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

Avlop sparikassans
verður - burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

Í sparikassanum
eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

# INNIHALDSYVIRLIT


LEIÐSLUÁTEKNING 6
ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA 7
LEIÐSLUFRÁGREIÐING 8
ROKNSKAPARFRÁGREIÐING 8
VÁÐAR OG VÁÐASTÝRING 12
RAKSTRARROKNSKAPUR 15
FÍGGJARSTØÐA - OGN 16
FÍGGJARSTØÐA - SKULD 17
ÚTGREINING AV EGINPENINGI 18
YVIRLIT YVIR NOTUR 19
NOTUR - SOLVENSUPPGERÐ 20
NOTUR - NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR 21
NOTUR - 5 ÁRA YVIRLIT 28
NOTUR 29
NEVND OG STJÓRN 38
UMBOÐSRÁÐ 40

# LEIÐSLUÁTEKNING

Vit hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2009 fyri Norðoya Sparikassa.

Ársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu við ársenda og úrslitinum fyri 2009.

Somuleiðis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rætta frágreiðing um gongdina í virksemi sparikassans og fíggjarligu støðu, umframt eina frágreiðing av teimum mest týdningarmiklu váðum og óvissum, ið sparikassin kann verða ávirkaður av.

Ársfrásøgnin verður viðmælt aðalfundinum at góðkenna.

Klaksvík, 15. apríl 2010

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>*formaður* | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Finn Kjølbro |
| Páll Klettskarð | Erling Petersen | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Julianna Thomsen | Guðrið Lava Olsen | Eyðun Nolsøe |

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Norðoya Sparikassa fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2009 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um fíggjarligt virksemi.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi. Henda ábyrgd umfatar gerð av, ígongsetan og áhaldni í innanhýsis eftirliti, ið er neyðugt fyri at gerast kann ein ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan skeivleikar av týdningi, og uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, ið framdar eru, eftir umstøðunum, kunnu ætlast at vera rímiligar.

## Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað í samsvari við galdandi grannskoðarareglur, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, ið skal til fyri at fáa grannskoðaraprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið er neyðugt, fyri at stovnurin kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki at gera eina niðurstøðu um góðskuna á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin umfatar eisini støðutakan til, um roknskaparhátturin, ið leiðslan hevur nýtt, er hóskandi, um roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og eina heildarmetan av samlaðu ársfrásøgnini.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðaraprógv, sum er hóskandi grundarlag fyri niðurstøðu okkara.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum stovnsins tann 31. desember 2009, umframt úrslitið av stovnsins virksemi og peningastreymi fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2009 í samsvari við upplýsingarkrøv fyri fíggjarligt virksemi.

## Útsøgn um leiðslufrágreiðingina

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina leiðslufrágreiðing, ið er rættvísandi og í samsvari við lóg um fíggjarstovnar.

Grannskoðanin hevur ikki umfatað leiðslufrágreiðingina, men vit hava í samsvari við lóg um fíggjarstovnar lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki framt onnur stig afturat tí framdu grannskoðanini av ársfrásøgnini.

Tað er við grundarlagi í hesum, okkara fatan, at upplýsingarnir í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársfrásøgnina.

| | |
|---|---|
| Nykøbing Mors, 15. apríl 2010 | Klaksvík, 15. apríl 2010 |
| BDO<br>Statsautoriseret revisionsaktieselskab | Numero Sp/f |
| Jens Peter Egebjerg Hansen<br>*Statsautoriseret revisor* | Símun Absalonsen<br>*løggildur grannskoðari* |

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## Roknskaparfrágreiðing

### Ársúrslitið

Norðoya Sparikassi hevði í 2009 eitt hall áðrenn skatt uppá 46,2 mió.kr. móti einum halli uppá 63,2 mió.kr. í 2008. Eftir skatt gjørdist úrslitið í 2009 eitt hall uppá 38,0 mió.kr. móti einum halli uppá 55,1 mió.kr. í 2008.

Høvuðsorsøkin til hallið í 2009 er, at sparikassin seinastu árini hevur økt um útlán til vinnulívið, og hetta, saman við óhepnum íløgum, hevur ført við sær øktar niðurskrivingar. Sparikassin hevur í 2009 framt niðurskrivingar uppá útlán uppá 46,3 mió.kr., ella eins nógv sum í 2008, tá niðurskrivingar uppá útlán vóru 45,1 mió.kr.

Aðrar orsøkir til hallið í 2009 eru m.a. gjald sparikassans vegna Bankapakka I, sum í 2009 var íalt 11,6 mió.kr. Harafturat hevur sparikassin staðfest eina niðurgongd í netto rentu- og kostnaðarinntøkum uppá 11,3 mió.kr. í 2009, tá samanborið verður við 2008.

Nevnd og stjórn sparikassans meta støddina av niðurskrivingum, og harvið ársúrslitið at vera alt annað enn nøktandi.

### Broytingar í nýttum roknskaparhátti

Sum avleiðing av broytingum í kunngerð um roknskap fyri peningastovnar galdandi fyri 2009, hevur sparikassin gjørt broytingar í nýttum roknskaparhátti fyri virðisáseting av ognum, niðurskrivingum av útlánum og øðrum ognum.

### Samtaksroknskapur

Sparikassin ger ikki samtaksroknskap fyri 2009 grundað á, at dótturfelag sparikassans Sp/f Heim ikki hevur rikið sjálvstøðugt virksemi í 2009. Virksemið í dótturfelagnum við ársbyrjan, í árinum og við ársenda, er ikki mett at verða týðandi í mun til samlaða virksemi sparikassans.

### Rakstrarroknskapurin

### Netto- rentu og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkur eru falnar úr 78,9 mió.kr. í 2008 til 67,6 mió.kr. í 2009, ella við 11,3 mió.kr. svarandi til 14,3 %.

Sparikassin hevur staðfest minkandi kostnaðar- og provisjónsinntøkur í 2009, tá tær vóru 5,7 mió.kr. minni enn í 2008. Hetta kemst serliga av, at sparikassin valdi at taka øll uttanlandslán heim í 2009 og at gevast við hesi tænastu, men vit hava eisini staðfest minkandi virksemi, og harvið fallandi inntøkur av flest øllum tænastugjøldum.

Netto rentuinntøkurnar fullu somuleiðis 3,8 mió.kr. í 2009 í mun til 2008. Sparikassin hevði fyrra hálvár 2009 ein minkandi rentumarginal í mun til undanfarin ár. Tá váðin í útlánum í løtuni er størri enn vanligt, og hetta somuleiðis sæst aftur í samlaðu niðurskrivingunum uppá útlán, gjørdu vit av at økja um rentumarginalin. Hetta hevur gjørt, at netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar gjørdust 35,5 mió.kr. seinna hálvár 2009 móti 32,1 mió.kr. fyrra hálvár 2009.

### Útreiðslur og avskrivingar

Tær samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá sparikassanum íroknað avskrivingar uppá ítøkiligar ognir, útreiðslur til Bankapakka I og útgjøld úr Gávugrunninum, eru í 2009 hækkaðar við 2,2 mió.kr. til 66,3 mió.kr., svarandi til 3,4 %. Orsøkin til hesa hækking er, at gjaldið til Bankapakka I er hækkað við 5,3 mió.kr.

Bankapakki I er galdandi fyri tíðarskeiðið frá 30. september 2008 til 30. september 2010. Orsøkin til at gjaldið er hækkað í 2009 úr 1,8 mió.kr. til 7,1 mió.kr. er, at tað í 2008 bert er innroknað gjald fyri 3 mánaðir, meðan tað í 2009 er innroknað ábyrgdarprovisjón fyri alt árið.

Útreiðslurnar til starvsfólk og fyrisiting eru falnar við 4,6 mió.kr. ella 8,2 % til 51,4 mió.kr. Av hesum eru útreiðslurnar til starvsfólk falnar við 0,6 mió.kr. ella 2,5 % til 24,9 mió.kr., meðan aðrar fyrisitingarútreiðslur eru falnar við 4,0 mió.kr. ella 13,1 % til 26,6 mió.kr.

Av- og niðurskrivingar uppá ítøkiligar ognir eru minkaðar við 3,3 mió.kr. til 4,6 mió.kr. Í hesum roknskaparposti innganga eyka niðurskrivingar uppá ognir til egnu nýtslu við 0,6 mió.kr. móti 5,0 mió.kr. í 2008.

Sparikassin hevur í 2009 havt stórt fokus á útreiðslur. Hetta hevur ført við sær, at sparikassin í 2009 hevur latið eina deild aftur, umframt at aðrar tillagingar eru gjørdar. Hetta hevur ført við sær, at starvsfólkatalið er fallið við 8,5 % í 2009.

Sparikassin hevur sum mál, at útreiðslustigið skal vera undir 50 %. Leiðslan fegnast tí um, at útreiðslurnar eru falnar í 2009, men hóast hetta er útreiðslustigið hækkað úr 69 % til 74 %, samstundis sum netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar eru falnar í sama tíðarskeiði. Sparikassin heldur fast í málsetningi sínum á hesum øki, og vil hetta ítøkiliga vera gjørt við at minka enn meira um útreiðslurnar, samstundis sum arbeitt verður við at økja um inntøkugrundarlagið.

### Aðrar rakstrarinntøkur

Aðrar rakstrarinntøkur vóru í 2009 íalt 1,7 mió.kr. móti 1,1 mió.kr. í 2008. Hetta svarar til eina hækking uppá 0,6 mió.kr. Aðrar rakstrarinntøkur eru mest inntøkur av útleigan av íløguognum, umframt inntøkur í sambandi við umsiting av tryggingum til privatkundar.

### Virðisjavnan

Virðisjavnan vísir eitt tap í 2009 uppá 6,3 mió.kr. móti einum tapi í 2008 uppá 16,2 mió.kr.

Hetta úrslit stavar frá einum vinningi av virðisjavnan av lánsbrøvum uppá 1,8 mió.kr, umframt 0,1 mió.kr. av gjaldoyra. Hinvegin er talan um eitt tap av virðisjavnan av partabrøvum uppá 4,9 mió.kr. og einari neiligari javning av íløguognum uppá 3,3 mió.kr.

Sparikassin hevur í 2009 minkað um váðan av íløguognum, og tað er framvegis politikkur sparikassans at minka um marknaðarváðan, soleiðis at hann kemur niður á eitt enn lægri støði.

### Niðurskrivingar

Niðurskrivingar uppá útlán og ábyrgdir vóru 46,3 mió.kr. í 2009 móti 45,1 mió.kr. í 2008.

Niðurskrivingarprosentið í 2009 svarar til 2,7 % av øllum útlánum, niðurskrivingum, ábyrgdum og burturleggingum, móti 2,2 % í 2008. Sostatt hevur sparikassin hesi seinastu 2 árini niðurskrivað 4,9 % av øllum útlánum og ábyrgdum.

Tær samlaðu niðurskrivingarnar og burturleggingarnar eru ultimo 2009 íalt 58,3 mió.kr. svarandi til 3,2 % av øllum útlánum og ábyrgdum ultimo 2009.

### Kapitalpartar í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum

Virðisjavnan av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum gav eitt avlop í 2009 uppá 0,5 mió.kr. móti einum halli í 2008 uppá 17,8 mió.kr. Sum sparikassin upplýsti í roknskapinum fyri 2008, so var avgjørt at niðurlaga virksemið í dóttirfeløgum og síðani avtaka hesi.

### Fíggjarstøða

Fíggjarstøða sparikassans er minkað við 184 mió.kr. úr 2.450 mió.kr. til 2.266 mió.kr. svarandi til 7,5 %.

Útlán eru minkað frá 1.859 mió.kr. í 2008 til 1.838 mió.kr. í 2009, ið svarar til 1,1 %. Samstundis eru skyldur, ið ikki eru førdar í fíggjarstøðuna, falnar við 155 mió.kr. úr 215 mió.kr. til 60 mió.kr.

Hetta er einamest orsakað av, at uttanlandslán, ið sparikassin veitti veðhald fyri, eru útgoldin, og í staðin eru veitt sum beinleiðis lán frá sparikassanum, svarandi til 150 mió.kr. Soleiðis er tann samlaði váðin hjá sparikassanum í sambandi við útlán og ábyrgdir lækkaður við 162 mió.kr. ella 8 %.

Innlán sparikassans er í 2009 fallið við 116 mió.kr. úr 2.009 mió.kr. til 1.893 mió.kr. svarandi til 5,8 %. Sparikassin hevur sum mál at hava eitt útlánsprosent, umleið 100 ella lægri.

## Gjaldføri

Norðoya Sparikassi hevur gott gjaldføri. Yvirdekningurin í mun til lógarkravið var við árslok 2009 102,4 %.

Sparikassin hevði við árslok 2009 eitt útlánsprosent uppá 100,4. Umframt vanligt innlán, hevur sparikassin eginogn, innlán frá øðrum kredittstovnum og rætt at læna frá Danmarks Nationalbank. Hetta alt fyri at tryggja, at gjaldførið livir upp til lógarinnar krøv, umframt gjaldførispolitikk sparikassans.

Í sambandi við at Bankapakki I endar tann 30. september 2010, fer Norðoya Sparikassa at søkja um 3 ára individuelt statsgaranti, sum liður í at tryggja sparikassanum eitt framhaldandi javnt og gott gjaldføri tey komandi árini.

## Solvensur og kapitalviðurskifti

Eginogn sparikassans er, eftir at undirskotið í 2009 er drigið frá, 238,1 mió.kr.

Solvensur sparikassans var við árslok 16,3 % móti 15,1 % í 2008. Til tess at tryggja kapitalgrundarlagið enn betri, valdi Norðoya Sparikassi í 2009 at upptaka eitt ábyrgdarlán frá statinum, sum eftirstillað kapitalinnskot uppá 50 mió. kr. Fíggjarstøða sparikassans er minkað við 184 mió.kr. úr 2.450 mió.kr. til 2.266 mió.kr. svarandi til 7,5 %.

Umframt at gera upp lógarkravda solvensin, skal sparikassin harumframt gera upp ein individuellan solvenstørv. Sparikassin metir javnan um grundarlagið undir hesi uppgerð, mannagongdina í sambandi við hesa uppgerð og tær fyritreytir, ið verða lagdar sum grundarlag undir uppgerðini. Nærri er greitt frá um hesi viðurskifti undir váðar og váðastýring.

Við støði í hesum, metir leiðsla sparikassans, at solvensur sparikassans er nøktandi til tess at dekka tann váða, ið stendst av virksemi sparikassans.

## Meting um 2010

Tað er okkara fatan, at útlitini fyri 2010 eru heldur betri enn tey tvey undanfarnu árini. Norðoya Sparikassi væntar, at útreiðslurnar í 2010 verða á nøkunlunda sama støði sum í 2009. Tað er serliga galdandi, at sparikassin í mai 2010 flytir stóran part av KT veitingini til SDC, og standast stórar beinleiðis útreiðslur av hesi flyting og arbeiðinum í sambandi við hetta. Sparikassin heldur fast um framhaldandi neyva útreiðslustýring í 2010.

Útreiðslurnar til Bankapakka I fella burtur pr. 30. september 2010, og vil sparingin av hesum tí hava avmarkað virði í 2010. Bankapakki I hevur higartil samanlagt kostað Norðoya Sparikassa 16 mió.kr.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkur sparikassans vóru ikki nøktandi í 2009. Sparikassin metir, út frá avgerðum sparikassans í árinum 2009, at netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar verða umleið 10 mió.kr. hægri í 2010.

Við grundarlagi í eini hóskandi grundinntøku, neyvari útreiðslustýring og fokus á váða, likviditet og kapitalviðurskifti, hevur Norðoya Sparikassi eitt gott grundstøði við ársbyrjan 2010. Við støði í hesum væntar sparikassin at hava eitt ársúrslit eftir skatt, sum liggur um 0 kr. 2010.

## Norðoya Sparikassi luttøka í Bankapakka I og II

## Bankapakki I

Tann danski staturin veitti við Bankapakka I 2 ára ábyrgd fyri øllum innlánum og krøvum mótvegis teimum luttakandi peningastovnunum. Norðoya Sparikassi avgjørdi at vera við í hesi ábyrgdarskipan, ið er galdandi frá 30. september 2008 til 30. september 2010. Henda skipan letur upp fyri einum møguleika at leingja ábyrgdina, um hetta gerst neyðugt. Skipanin verður umsitin av Det Private Beredskab. Sparikassin hevur í 2009 goldið íalt 7,1 mió.kr. í ábyrgdarprovisjón til Det Private Beredskab. Samanlagt fyri hesi 2 árini væntast gjaldið hjá Norðoya Sparikassa at verða samanlagt 14,3 mió.kr. Sparikassin skal í 2010 gjalda íalt 5,3 mió.kr. undir hesi ábyrgd fram til 30. september 2010.

Umframt hesa ábyrgdarprovisjón hevur Norðoya Sparikassi bundið seg til at taka sín part av trygdini, sum Det Private Beredskab hevur veitt Finansiel Stabilitet A/S uppá tvær ferðir 10 mia.kr. ella samanlagt 20 mia.kr. Hetta skal dekka eitt møguligt undirskot í Finansiel Stabilitet A/S. Sparikassans partur av hesi ábyrgd er íalt 19,0 mió.kr. Finansiel Stabilitet A/S hevur boðað frá, at undirskot teirra í løtuni er uppgjørt til 5.820 mió.kr.

Sum úrslit av hesum hevur sparikassin burturlagt tann lutfalsliga partin, svarandi til 5,5 mió.kr. Soleiðis kann sparikassin í mesta lagi verða noyddur at gjalda 13,5 mió.kr. afturat undir hesi ábyrgd.

Í 2009 hevur Bankapakki I samanlagt ávirka rakstrarroknskap sparikassans við hesum upphæddum:

| | |
|---|---|
| Gjald av ábyrgdarprovisjón til Det Private Beredskab | 7,1 mió.kr. |
| Burturleggingar vegna hall í Finansiel Stabilitet A/S | 4,5 mió.kr. |
| Íalt | 11,6 mió.kr. |

## Bankapakki II

Bankapakki II gav øllum peningastovnum, ið uppfyltu solvenskravið, møguleika til at søkja statin um lán, sum varð sett sum hybridur kjarnukapitalur. Harumframt varð gjørt møguligt at søkja um individuelt statsgaranti í sambandi við 3 ára lán, við einari umsóknarfreist fram til 31. desember 2010. Endamálið við hesi skipan var at tryggja eitt skynsamt skifti, tá Bankapakki I gongur úr.

Norðoya Sparikassi søkti í 2009 um lán frá danska statinum, og lænti í hesum sambandi 50,7 mió.kr. av upphæddini undir Bankapakka II. Rentan er føst í avtalutíðarskeiðinum, og er hon 10,73 %. Lánið er roknað við sum hybridur kjarnukapitalur undir roknskaparpostinum "Eftirstillað kapitalinnskot".

## Hendingar eftir roknskaparlok

Tað eru ongar hendingar ella viðurskifti, sum er hend eftir roknskaparlok, ið kunnu flyta metingina av ársfrásøgn sparikassans fyri 2009.

## Váðar og váðastýring

### Váðar og váðastýring

Nevnd sparikassans skal syrgja fyri, at sparikassin hevur eina vælvirkandi váðastýring, herundir at allir týðandi váðar verða eyðmerktir, og at skipanir eru til váðastýring. Harafturat skulu ein váðapolitikkur og váðakarmar fastleggjast. Váðafrágreiðing viðvíkjandi teimum týðandi váðaorsøkunum eru partur av regluligari kunning til nevndina.

Tað áliggur stjórnini at tryggja, at nøktandi innanhýsis mannagongdir eru í samband við máting og stýring av váða.

Í sparikassanum er skilnaður ímillum eindirnar, sum avgreiða og tær, sum hava eftirlit.

Rakstur av peningastovnsvirksemi inniber, at man átekur sær nakrar serligar váðar so sum kredittváðar, marknaðarváðar, gjaldførisváðar og operatiónellar váðar. Hesum váðum, sum eru lýstir niðanfyri, sýnir sparikassin serligan ans í dagliga virki sínum, tí endamálið við sparikassans politikki er at avmarka tey tap, sum millum annað kunnu standast av óvæntaðari gongd á fíggjarmarknaðunum.

Roknast kann við, at tað kunnu vera aðrir váðar, enn teir, sum verða lýstir her, sum kunnu hava ávirkan fyri framhaldandi rakstur og menning sparikassans, men leiðslan hevur mett, at teir lýstu váðarnir, eru teir mest týðandi. Endamálið við hesum upplýsingum um váðar og váðastýring er at geva teimum, sum hava áhugamál í sparikassanum, betri møguleika at meta um váðaprofil og kapitaltørv.

### Kredittváði

Kredittváði merkir, at vandi er fyri, at tap íkemur, tá skuldarin ikki afturrindar lán og kredittir, tá hesi falla til gjaldingar, og á sama hátt, tá ábyrgdir skulu uppgerðast.

Sparikassin leggur í sínum kredittpolitikki og í síni kredittstýring herðslu á, at hvørki einstøk tap ella fleiri samlað tap innan ávísar vinnugreinar, skulu kunna gerast so stór, at hesi í síðsta enda kunnu hava álvarsligar fylgjur fyri sparikassans solvens. Tí hevur sparikassin seinnu árini miðvíst arbeitt við at avmarka kredittváðan, bæði sæð samlað og eitt nú innan fiskivinnu, sum er ein serliga váðamikil vinnugrein. Sparikassans kredittváði í fiskivinnuni er tí minkaður munandi. Samanlagt er kredittváði sparikassans í fiskivinnuni 83 mió.kr. Í notu 31 í roknskapinum er upplýst, at fiskivinna er 5% av kredittváðanum. Harafturat er partur av framleiðsluvinnuni at rokna sum fiskivinna, so íalt er kreditváðin frá fiskivinnu á landi og sjógvi 6% av samlaða kredittváðanum.

Síðan 2005 hevur sparikassin miðvíst spjatt virksemi sítt landafrøðiliga, soleiðis at kundagrundarlagið nú fevnir um alt føroyska meginøkið. Frammanundan virkaði sparikassin bert í sera avmarkaðan mun uttanfyri Norðoyggjar og Leirvík. Í dag er talan áleið um helvtarbýti. Tí vuksu útlán og innlán sparikassans nógv árini frá 2005-2007. Eftir at sparikassin í 2007 fekk eina hóskandi støðd, hevur ikki verið tráðað eftir vøkstri, men heldur at avmarka váðan, og er hetta staðfest í kredittpolitikkinum, sum seinast er dagførdur í desember 2009.

Kredittpolitikkurin viðger eisini stór engagement, har tað er ásett, at sparikassin skal minka munandi um samlaðu engagementini, sum eru størri enn 10% av basiskapitali sparikassans. Við verandi basiskapitali svarar hetta til kr. 27,2 mió. Ein bólkur av sínamillum samanhangandi kundum, verður roknaður sum eitt engagement, sambært galdandi kunngerð um stór engagement. Hesi engagementini vóru pr. 31.12.2009 íalt 84,1% av basiskapitali sparikassans svarandi til kr. 228,6 mió. Við teimum ætlanum og strategium, sum fyriliggja fyri hvørt einstakt engagement, verður roknað við, at engagementini, sum eru størri enn 10% av eginpeningi sparikassans, minka við 20-40 mió.kr. í 2010.

Niðurskrivingar sparikassans hava verið stórar í 2008 og 2009. Talan er fyrst og fremst um niðurskrivingar uppá útlán til fiskivinnuna, men eisini til aðrar vinnur, so sum handils- og tænastufyritøkur.

### Íløgukredittir

Sparikassin hevur bert í sera avmarkaðan mun veitt íløgukredittir í sambandi við íløgur í virðisbrøv, og hevur hetta ikki viðført munandi tap. Tó hevur sparikassin avgjørt at gevast við at veita íløgukredittir. Tann 31.12.2009 var samlaða debetsaldan á íløgukredittum í sparikassanum kr. 12,2 mió.

### Kredittviðgerðin

Sparikassin hevur í 2009 sett á stovn eina kredittfunktión og avsett neyðuga orku til hetta arbeiði. Uppgávan hjá kredittfunktiónini er at gjøgnumganga øll týðandi engagement í minsta lagi einaferð árliga. Gjøgnumgongdin umfatar greining av gjaldsevni og fíggjarstøðu kundans. Sparikassin ásetur við støði í framdu greiningunum karakter á hvørt einstakt engagement, samsvarandi karakterstiga Fíggjareftirlitisins. Karakterbýtið skal brúkast at geva leiðsluni eina mynd av bonitetinum hjá kundum sparikassans sum heild.

Kredittfunktiónin skal somuleiðis tryggja, at málsetningar og ásetingar í kredittpolitikkinum verða fylgdar, herundir m.a. at neyðug orka er avsett til eina effektiva viðgerð av truplum engagementum, hetta fyri at avmarka tapsvandan.

Regluligar kredittfrágreiðingar verða latnar nevnd sparikassans. Hetta er ætlað sum amboð hjá nevndini at eyðmerkja og stýra kredittváða sparikassans, sum umrøtt omanfyri.

Sparikassin metir í minsta lagi kvartárliga um tørvin á niðurskriving av einstøkum útlánum og av niðurskriving uppá bólkar av útlánum við felags váðaeyðkennum. Somuleiðis verður mett kvartárliga um tørvin at burturleggja uppá ábyrgdir. Bólkaniðurskrivingin verður roknað eftir myndli, sum er mentur av Lokale Pengeinstitutter, sum er ein felagsskapur av peningastovnum í Danmark og Føroyum, sum Norðoya Sparikassi er limur í.

### Marknaðarváði

Marknaðarváði er at rokna sum váðin fyri at marknaðarvirði av sparikassans aktivum og passivum ávirkast av broytingum í marknaðinum. Marknaðarváðin fevnir um rentu-, gjaldoyra og partabrævaváða.

### Rentuváði

Rentuváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við rentubroytingar á fíggjarmarknaðunum. Upphæddin, sum upplýst er í roknskapinum sum rentuváði, er kurstap, sum sparikassin fær, um rentustøðið hækkar 1%-stig.

Sparikassin hevur framvegis ein lágan rentuváða. Tann 31.12.2009 var rentuváðin kr. 5,5 mió. Hetta svarar til 2% av basiskapitalinum.

### Partabrævaváði

Partabrævaváðin er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í partabrævakursum.

Partabrævaíløgur umfata børsskrásett partabrøv, óskrásett partabrøv og kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum. Sparikassin hevur eingi børskrásett partabrøv. Í notunum er upplýst, hvørji tey tilknýttu og assosieraðu feløgini eru, og eisini verður víst til frágreiðing aðrastaðir um nýttan roknskaparhátt. Dagsvirðið av kapitalpørtunum er tengt at gongdini og útlitunum hjá hesum feløgum.

### Gjaldoyraváði

Gjaldoyraváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í gjaldoyrakursum.

Sparikassin hevur gjaldoyraváða í sambandi við goymslu av kontantum gjaldoyra. Sparikassin hevur altíð eina hóskandi nøgd í ávísum gjaldoyrum í sambandi við kontantan handil við viðskiftafólk. Sparikassin hevur ikki aðra ogn ella skuld í fremmandum gjaldoyra.

Gjaldoyrastøða sparikassans, sum er upplýst undir lyklatølunum, var 0 tann 31.12.2009.

### Gjaldførisváði

Gjaldførisváði er váðin fyri, at sparikassin ikki er mentur at halda gjaldsskyldur sínar, um gjaldførið ikki er nøktandi. Somuleiðis kann vandi vera fyri, at útvegan av gjaldføri gerst meira kostnaðarmikil, enn roknað verður við. Sparikassin leggur í stýringini av gjaldførisváðanum herðslu á at tryggja eitt gott gjaldføri bæði í mun til stuttfreistaðar og langfreistaðar skyldur, og at fíggingarkostnaðurin er rímiligur.

Galdandi lóg ásetir minstukrøv til gjaldføri sparikassans. Sparikassin ásetir sjálvur eitt innanhýsis krav til gjaldføri, sum er munandi hægri enn minstakravið. Tann 31.12.2009 var yvirdekningurin í mun til minstakrav lógarinnar 102,4%.

Sparikassin fylgir neyvt við gongdini í gjaldførinum, soleiðis at neyðug stig kunnu takast um óvæntaðar broytingar koma fyri.

Sparikassin er limur í Det Private Beredskab. Hetta merkir, at sparikassin er umfataður av trygdini, sum danski staturin veitir fyri øllum innlánum í sparikassanum. Hendan skipan fer úr gildi 30. september 2010. Eftir hetta verða innlán bert fevnd av trygdini frá Innskjótaraábyrgdargrunninum. Danska Fólkatingið hevur samtykt at hækka ábyrgdarupphæddina frá DKK 300.000 til EUR 100.000, sum svarar til umleið DKK 744.000 við gildi frá 1. oktober 2010. Væntandi verður lógin sett í gildi fyri Føroyar í næstum.

Hvør peningastovnur sær hevur møguleika at søkja um trygd frá statinum fyri innskotum, sum varða í mesta lagi 3 ár. Hetta kann gerast við útskrivan av lánsbrøvum, sum danski staturin veðheldur fyri. Norðoya Sparikassi hevur søkt um hesa trygd. Ætlanin er at útskriva og selja hesi lánsbrøv í 2. ársfjórðingi 2010.

### Operatiónellur váði

Hetta er váði í samband við tap, sum kunnu koma beinleiðis ella óbeinleiðis av manglandi ella skeivum innanhýsis mannagongdum, menniskjaligum feilum, feilum í skipanum ella av uttanífrá komandi hendingum. Somuleiðis er váði í sambandi við umdømið umfatað av operatiónella váðanum.

Sparikassin stýrir hesum váða við virksigongdum og innanhýsis eftirliti. Virkisgongdirnar verða javnan endurskoðaðar og broyttar um neyðugt. Sparikassin setur neyðuga orku av til eftirlit, og verða eftirlitisuppgávurnar framdar av starvsfólki, sum fyriskipanarliga eru óheft av teimum, sum avgreiða.

### Compliance funktión

Sparikassin arbeiðir við at seta á stovn compliance funktión, sum skal tryggja, at sparikassin á virðisbræva- og íløguøkinum lýkur bæði uttanhýsis og innanhýsis krøv.

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 4 | Rentuinntøkur o.a. | 137.524 | 153.453 |
| 5 | Rentuútreiðslur o.a. | 75.565 | 87.700 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **61.959** | **65.753** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 123 | 1.467 |
| 6 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 6.520 | 12.215 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 987 | 559 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **67.615** | **78.876** |
| 7 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, partabrøvum, gjaldoyra o.ø. | -6.299 | -16.168 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 1.707 | 1.126 |
| 8 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 51.443 | 56.085 |
| 9 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 4.571 | 7.966 |
| 10 | Aðrar rakstrarútreiðslur | 7.294 | 25 |
| 11 | Avskrivingar og niðurskrivingar uppá skuldarar, netto | 46.341 | 45.126 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 485 | -17.845 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **-46.141** | **-63.213** |
| 12 | Skattur | -8.156 | -8.103 |
| | **Ársúrslit** | **-37.985** | **-55.110** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 40.396 | 39.112 |
| 13 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 54.141 | 205.949 |
| 14 | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.837.592 | 1.858.858 |
| 15 | Lánsbrøv til dagsvirði | 203.113 | 174.482 |
| 16 | Partabrøv o.a. | 41.971 | 55.402 |
| 17 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 987 | 2.461 |
| 18 | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 1.085 | 601 |
| 19 | Fastognir íalt | 41.560 | 57.548 |
| | Íløguognir | 19.644 | 39.115 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 21.916 | 18.433 |
| | Aðrar materiellar ognir | 18.414 | 21.798 |
| 20 | Útsett skattaogn | 16.202 | 8.599 |
| | Yvirtiknar ognir | 9.001 | 5.741 |
| 21 | Aðrar ognir | 1.922 | 19.625 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.266.384** | **2.450.176** |



# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | **Skuld** | | |
| 22 | Skuld til peningastovnar | 65.000 | 119.866 |
| 23 | Innlán | 1.892.799 | 2.009.083 |
| | Onnur skuld | 11.241 | 20.233 |
| | **Skuld tilsamans** | **1.969.040** | **2.149.182** |
| | **Avsetingar** | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.548 | 2.963 |
| | Avsetingar til útsettan skatt | 0 | 423 |
| | Avsetingar til tap uppá ábyrgdir | 1.396 | 8.551 |
| | Aðrar avsetingar | 5.535 | 0 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **9.479** | **11.937** |
| 24 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **49.814** | **0** |
| | **Eginpeningur** | | |
| 25 | Ábyrgdarpeningur | 6.763 | 7.066 |
| | Gávugrunnur | 0 | 1.000 |
| | Uppskrivingargrunnur | 0 | 6.252 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 269.273 | 329.849 |
| | Flutt frá ársúrsliti | -37.985 | -55.110 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **238.051** | **289.057** |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.266.384** | **2.450.176** |

# ÚTGREINING AV EGINPENINGI

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 7.066 | 6.912 |
| | Tilgongd í árinum | 8 | 278 |
| | Frágongd í árinum | 311 | 124 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **6.763** | **7.066** |
| | | | |
| | Gávugrunnur við ársbyrjan | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt til yvirskotsbýti | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá býti av ársvinningi | 0 | 1.000 |
| | **Gávugrunnur við ársenda** | **0** | **1.000** |
| | | | |
| | Aðrir grunnar við nettouppskriving eftir innara virði við ársbyrjan | 0 | 0 |
| | Broyting primo | 0 | 1.093 |
| | Flutt frá býti av ársvinningi | 0 | -1.093 |
| | **Aðrir grunnar við nettouppskriving eftir innara virði við ársenda** | **0** | **0** |
| | | | |
| | Uppskrivingargrunnurin við ársbyrjan | 6.252 | 0 |
| | Afturførdar uppskrivingar | 6.252 | 0 |
| | Uppskrivað í árinum | 0 | 6.252 |
| | **Uppskrivingargrunnurin við ársenda** | **0** | **6.252** |
| | | | |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 274.739 | 329.125 |
| | Broyting primo | -12.718 | 724 |
| | Flutt frá gávugrunni, netto | 1.000 | 0 |
| | Afturførdar uppskrivingar | 6.252 | 0 |
| | Flutt frá ársúrsliti | -37.985 | -55.110 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | **231.288** | **274.739** |
| | | | |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **238.051** | **289.057** |

*Viðm: Flutt avlop við ársenda 2008 stemma ikki við flutt avlop við ársbyrjan 2009 vegnan broyttan roknskaparhátt.*

| **Útgreining av broytingum í eginpeningi við ársbyrjan:** | |
|---|---|
| Broytingar av niðurskrivingum og burturleggingum | -2.352 |
| Broytingar av stovningarprovisjónum | -10.590 |
| Broytingar av skrásettum virðisbrøvum | 224 |
| **Tilsamans** | **-12.718** |



# YVIRLIT YVIR NOTUR


| Nota | | Síða |
|---|---|---|
| 1 | KAPITAL- OG SOLVENSUPPGERÐ | 20 |
| 2 | NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 21 |
| 3 | 5 ÁRA HØVUÐS- OG LYKLATØL | 28 |
| | NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN | |
| 4 | RENTUINNTØKUR | 29 |
| 5 | RENTUÚTREIÐSLUR | 29 |
| 6 | KOSTNAÐAR- OG PROVISJÓNSINNTØKUR | 29 |
| 7 | VIRÐISJAVNAN | 29 |
| 8 | ÚTREIÐSLUR TIL STARVSFÓLK OG FYRISITING | 29 |
| 9 | AV- OG NIÐURSKRIVINGAR AV ÍTØKILIGUM OGNUM | 30 |
| 10 | AÐRAR RAKSTRARÚTREIÐSLUR | 30 |
| 11 | NIÐURSKRIVINGAR UPPÁ ÚTLÁN V.M. | 30 |
| 12 | SKATTUR | 31 |
| | NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA | |
| 13 | OGN HJÁ FÍGGJARSTOVNUM OG TJÓÐBANKUM | 31 |
| 14 | ÚTLÁN | 32 |
| 15 | LÁNSBRØV | 32 |
| 16 | PARTABRØV | 32 |
| 17 | KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM FYRITØKUM | 32 |
| 18 | KAPITALPARTAR Í TILKNÝTTUM FYRITØKUM | 33 |
| 19 | ÍTØKILIGAR OGNIR | 34 |
| 20 | ÚTSETT SKATTAÁOGN | 34 |
| 21 | AÐRAR OGNIR | 34 |
| 22 | SKULD TIL PENINGASTOVNAR OG TJÓÐBANKAR | 35 |
| 23 | INNLÁN | 35 |
| 24 | EFTIRSTILLAÐ KAPITALINNSKOT | 35 |
| 25 | ÁBYRGDARPENINGUR | 35 |
| 26 | AÐRAR SKYLDIR UTTANFYRI JAVNAN | 35 |
| 27 | OGNIR SETTAR SUM TRYGD | 36 |
| 28 | OGNARVIÐURSKIFTI | 36 |
| 29 | NÆRSTANDANDI PARTAR | 36 |
| 30 | NEVND OG STJÓRN | 36 |
| | NOTUR UM AÐRAR UPPLÝSINGAR | |
| 31 | KREDITTVÁÐAR | 37 |
| 32 | MARKNAÐARVÁÐAR | 37 |
| 33 | RENTUVÁÐAR | 37 |

# NOTUR

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Kapital- og solvensuppgerð** | | |
| | Eginpeningur | 238.051 | 289.057 |
| | Útsett skattáogn | -16.202 | -8.599 |
| | Uppskrivingargrunnur | 0 | -6.252 |
| | Hybridur kjarnukapitalur | 49.814 | 0 |
| | **Kjarnukapitalur, aftaná frádrøg** | **271.663** | **274.206** |
| | | | |
| | Eginpeningur | 238.051 | 289.057 |
| | Útsett skattáogn | -16.202 | -8.599 |
| | Hybridur kjarnukapitalur | 49.814 | 0 |
| | **Basiskapitalur áðrenn frádrøg** | **271.663** | **280.458** |
| | | | |
| | Basiskapitalur áðrenn frádrøg | 271.663 | 280.458 |
| | Frádráttur fyri marknaðarváða | 0 | -4.157 |
| | **Basis kapitalur aftaná frádrøg** | **271.663** | **276.301** |
| | | | |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 1.577.331 | 1.622.467 |
| | Vektaði tøl undir strikuni | 36.439 | 182.012 |
| | Vektaði tøl við marknaðarváða | 55.844 | 51.960 |
| | **Vektaði tøl tilsamans** | **1.669.614** | **1.856.439** |
| | | | |
| | Solvensprosent | 16,3% | 15,1% |
| | | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 16,3% | 14,8% |

Nota

2 **Nýttur roknskaparháttur**

Alment

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvar við lóg um fíggjarligt virksemi o.a. umframt kunngerð um framløgu av fíggjarligum frágreiðingum hjá kredittstovnum v.m.

Broytingar í nýttum roknskaparhátti

Sum avleiðing av broytingum í kunngerð um roknskap fyri peningastovnar galdandi fyri 2009, hevur sparikassin gjørt broytingar í nýttum roknskaparhátti fyri virðisáseting av ognum, niðurskrivingum av útlánum og øðrum ognum.

Í tráð við tillagingarásetingar eru samanberingstøl ikki tillagað.

Alment um ásetan og máting

Allar inntøkur verða roknaðar við í rakstarroknskapin í mun til tað tíðarskeið, tær verða vunnar, og allar útreiðslur verða roknaðar við í tann mun, tær viðvíkja roknskaparárinum. Tó verða ávísir postar roknaðir beinleiðis umvegis eginognina, eftir at tann skattliga ávirkanin er ávikavist løgd afturat ella drigin frá.

Ogn verður roknað inn í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini koma sparikassanum tilgóðar, og ein meting av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða roknaðar við í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini ikki koma sparikassanum tilgóðar, og virði av skylduni álítandi kann útroknast.

Keyp av fíggjarligum ognum verða roknað við í fíggjarstøðuna avrokningardagin. Somuleiðis verður hildið uppat við at rokna seldar fíggjarligar ognir við í fíggjarstøðuna avrokningardagin.

Hildið verður uppat at rokna fíggjarligar skyldur við í javnan, tá skyldan er hildin uppat gjøgnum uppfyllan, ella við at hon er sett ella farin úr gildi.

Við áseting og uppgerð av ognum og skyldum verður tikið atlit at upplýsingum, ið koma til okkara kunnleika eftir uppgerðardagin, og inntil vit gera ársfrásøgnina, um so er, at hesar upplýsingar staðfesta ella avnokta tey viðurskifti, ið eru hend í seinasta lagi á uppgerðardegnum.

Tá ognir ella skyldur verða ásettar í fíggjarstøðuna á fyrsta sinni, verður hetta gjørt til dagsvirði. Tó verða fastar ognir ásettar til keypsprís, fyrstu ferð tær verða innsettar í fíggjarstøðuna.

Aftaná hetta verða ognir og skyldur uppgjørdar sum ásett fyri hvønn roknskaparpost sær niðanfyri. Keyp og søla av fíggjarligum ognum verða roknaðar við á avrokningardegnum.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða ásettar til amortiseraðan útveganarkostnað, soleiðis at tær verða roknaðar við einari støðugari effektivari rentu alt avtalutíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður gjørt upp sum upprunaligt útveganarvirði við frádrátti av møguligum avdráttum og við ískoyti/frádráttum av allari amortiseringini av muninum millum útveganarkostnað og áljóðandi upphædd.

Rokskaparligar metingar

Roknskaparliga virði av ávísum ognum og skyldum eru fevnd av metingum um, hvussu hendingar í framtíðini kunna ávirka virði av hesum ognum og skyldum.

Tey øki, har roknskaparligar metingar hava størst ávirkan á roknskapin, eru fylgjandi:

- Niðurskrivingar uppá útlán
- Dagsvirði av óskrásettum fíggjarligum ognum
- Dagsvirði av føstum ognum
- Útsett skattaáogn

Tær metingar, ið eru gjørdar, eru við grundarlagi í fyritreytum, sum leiðslan metir vera forsvarligar, men sum eru ótryggar. Harumframt er sparikassin ávirkaður av váðum og ótryggleikum, ið kunnu føra við sær, at tey uppgjørdu úrslitini kunnu víkja frá metingunum. Tá talan er um niðurskrivingar uppá útlán og annan ágóða, eru týðandi metingar gjørdar í samband við ásetan av váðanum fyri, at ikki allar ásettar framtíðar gjaldingar verða móttiknar.

## Niðurskrivingar uppá útlán

Niðurskrivingar uppá útlán verða gjørdar við at taka atlit at virðislækking á útlánum. Niðurskrivingar verða gjørdar sum ein samanseting av stakum niðurskrivingum og niðurskrivingum uppá bólkar, og eru fevndar av fleiri metingum, eitt nú fyri hvørji útlán ella bólkar av útlánum, er staðfest óheft ábending um virðislækking, metingar um framtíðar gjaldingar og áseting av virði av veittum trygdum.

## Dagsvirði av ikki skrásettum fíggjarligum ognum

Dagsvirði av óskrásettum fíggjarligum ognum verður ikki í øllum førum stuðlað av gjørdum marknaðarskrásetingum, og ger hetta, at ásetingin av dagsvirði í stóran mun eru grundað á roknskaparligar ásetingar og metingar.

## Dagsvirði av føstum ognum

Tá dagsvirði av ognum til egna nýtslu og íløguognum verður ásett, er hetta knýtt at roknskaparligum metingum, heruppií, hvat vit vænta, at ognirnar væntast at kasta av sær og krøv til avkastprosent, ið sett verða til ognirnar.

## Útskotin skattaogn

Framførd skattlig hall verða tikin við í uppgerðina av útsettari skattaogn í tann mun, tað er sannlíkt, at tað væntast, at tað í framtíðini væntast at verða ein skattskyldug inntøka til ráðs, har framførda hallið kann gagnnýtast. Áseting av útsettari skattaogn ber sostatt við sær eina framskriving og meting av framtíðar skattskyldugari inntøku.

## Samtaksroknskapur

Sparikassin ger ikki samtaksroknskap fyri 2009, tá dóttirfelag sparikassans Sp/f Heim, ið sparikassin eigur 100 %, ikki longur hevur nakað sjálvstøðugt virksemi, at ognin í hesum felag er avmarkað, og at sparikassin hevur ætlanir um at avtaka felagið. Fíggjarstøðan hjá Sp/f Heim javnvigar við 0,5 mió.kr., sum umfatar reiðan pening, ið stendur á konto í sparikassanum.

Fyritøkur, ið ikki verða stýrdar av sparikassanum, ella har sparikassin ikki útinnir avgerandi ávirkan, verða mettar sum assosieraðar fyritøkur.

## Útlendskt gjaldoyra

Ágóði, skyldur og aðrir gjaldoyraligir postar í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru avroknað uppgerðardagin, verða umroknað við tí endakursi, sum er galdandi fyri viðkomandi gjaldoyra uppgerðardagin. Gjaldoyramunir, ið standast millum kursin handilsdagin, gjaldsdagin, og uppgerðardagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum 'Virðisjavnan'.

## Mótrokning

Áogn og skyldur verða bert mótroknaðar, um løgfrøðisligur rættur er til staðar at mótrokna upphæddir, og um tað er ætlanin at nettoavrokna ella realisera ognina og innfría skyldina samstundis.

## Rakstrarroknskapurin

## Rentur, kostnaður og provisjónir

Rentuinntøkur og rentuútreiðslur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin í tí tíðarskeiðinum, sum tær viðvíkja. Provisjónir og kostnaðarinntøkur, sum eru partar av effektivu rentuni av einum útláni, verða innroknaðar sum ein partur av amortiseraða kostprísinum og verða harvið inntøkuførdar yvir alt afturgjaldingarskeiðið á útláninum.

Rentuinntøkur av niðurskrivaðum parti av útláni verða førdar undir roknskaparpostinum niðurskrivingar uppá útlán og áognir v.m.

## Vinningsbýti av partabrøvum

Vinningsbýti av partabrøvum verður innroknað í rakstrarroknskapin, um sparikassin hevur rætt til at taka ímóti vinningsbýtinum. Hetta verður vanliga gjørt, tá vinningsbýtið er samtykt á aðalfundi felagsins.

## Virðisjavnan

Virðisjavnan umfatar realiserað og órealiserað virðisjavnan av fíggjarognum og øðrum avleiddum fíggjarramboðum og virðisjavnan av dagsvirði av íløgum í fasta ogn.

## Aðrar rakstrarútreiðslur

Aðrar rakstrarútreiðslur umfata útreiðslur, sum ikki roknast uppí aðrar postar í rakstrarroknskapinum, herundir provisjón viðvíkjandi statstrygdini og útgjøld úr gávugrunni sparikassans.

## Niðurskrivingar uppá útlán og áogn v.m.

Niðurskrivingar uppá útlán og áogn v.m. inniheldur niðurskrivingar uppá útlán, áogn hjá peningastovnum og tjóðbankum og aðra áogn, sum kann hava við sær kredittváða. Eisini umfatað er burturlegging uppá ábyrgdir og óbrúktar kredittir og seinni virðisjavnan av hesum postum. Niðurskriving uppá ábyrgdir verður bókað sum burturlegging móti tapi uppá ábyrgdir. Niðurskriving uppá óbrúktar kredittir verður bókað sum aðrar burturlagdar skyldur.

## Skattur

Skattur í árinum, sum umfatar ársins aktuella skatt og broyting í útsettum skatti, verður í rakstrarroknskapinum bókað við tí partinum, sum stavar frá ársúrslitinum og beinleiðis á eginkapitalin við tí partinum, sum stavar frá bókingum beinleiðis á eginognina.

Sparikassin er ikki samskattaður við dótturfeløg.

## Fíggjarstøða

## Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum

Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum umfatar goymslu av peningaseðlum og myntum í øllum gjaldoyrum og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum.

## Áogn í peningastovnum og tjóðbankum

Áogn í peningastovnum og tjóðbankum umfatar áogn í peningastovnum og tíðarinnskot í tjóðbankum. Roknskaparposturin verður uppgjørdur sum amortiseraður kostprísur, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Útlán og aðrar áognir

Útlán og aðrar áognir verða uppgjørdar sum amortiseraður kostprísur frádrigið móttiknar kostnaðir og stovningarprovisjónir, har lagt er afturat munandi transaktiónskostnaðir, sum eru partur av effektivu rentuni á láninum.

Útlán og aðrar áognir verða javnan kannað fyri niðurskrivingartørv út frá fastløgdum objektivum ábendingum um virðisminking, partvíst einsæris fyri øll signifikant útlán og lán, sum ikki hóska í ein bólk, og partvíst sum bólkar av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Niðurskrivað verður við muninum millum roknskaparliga virðið áðrenn niðurskrivingar og nútíðarvirðið av væntaðu framtíðar gjaldsstreyminum av útláninum.

Ein objektiv ábending um virðisminking verður roknað at vera til staðar, um ein ella fleiri av hesum hendingum fyriliggja:

- Lántakarin er í fíggjarligum trupulleikum
- Lántakarin heldur ikki treytirnar í lánsavtaluni
- Treytirnar í lánsavtaluni vera gjørdar linari vegna lántakarans fíggjarligu trupulleikar
- ella tað er sannlíkt, at lántakarin fer í konkurs ella verður umfataður av aðrari fíggjarligari endurreisn

Fyri útlán og ágóðar, sum ikki eru niðurskrivað einsæris, metir sparikassin fyri hvønn bólk av útlánum, hvørt talan er um objektiva ábending um virðisminking.

Sparikassin metir um niðurskrivingartørv av bólkum av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Sparikassin bólkar útlánini í 3 bólkar, ein fyri privatkundar og tveir fyri vinnukundar.

Metingin av bólkunum verður gjørd eftir einum segmenteringsmyndli, sum er mentur av Felagnum fyri Lokalar Pengastovnar, sum eisini stendur fyri viðlíkahaldi og framhaldandi menning av myndlinum. Myndilin fastleggur samanhangin i ymsu bólkunum millum staðfest tap og nakrar signifikantar forklárandi landsbúskaparligar variablar við eini linju regressiónsgreining. Sum variablar verður m.a. brúkt arbeiðsloysi, húsaprísir, renta, tal av konkursum/tvingsilssølum v.m.

Segmenteringsmyndilin er í útgangsstøðinum útroknaður grundað á tapsupplýsingar fyri allan peningastovnsgeiran. Sparikassin skal tí meta, um tilpassast skal til egin viðurskifti, soleiðis at tað eru hesi tilpassaðu estimatini, sum verða brúkt í útrokningini av niðurskriving uppá bólkar. Fyri hvønn bólk av útlánum og ágóðum fæst eitt estimat, sum sigur, hvussu stór virðisminkingin er í prosent av einum bólki á fíggjarstøðudagfestingini. Við at samanbera upprunaliga tapsváðan fyri einstaka útlánið við tapsváðan við endan á aktuella roknskaparskeiðnum, framkemur upphæddin frá einstaka útláninum til niðurskrivingarnar fyri bólkar.

### Leasing
Norðoya Sparikassi hevur hvørki leasingogn ella skyldur.

### Fíggjarlig ogn (lánsbrøv og partabrøv)
Fíggjarlig ogn sum t.d. lánsbrøv, partabrøv og aðrir kapitalpartar verða bókaðir til dagsvirði.

Fyri virðisbrøv, sum eru skrásett á keypsskála, verður dagsvirðið ásett eftir alment noteraða kursinum við afturlating á fíggjarstøðudagfestingini, um ikki hesin kursur roknast fyri at vera misvísandi fyri veruliga dagsvirðið.

Í øllum øðrum førum verður dagsvirðið ásett eftir alment gókendum virðisásetingarháttum, sum hava til endamáls at áseta transaktiónsprísin, sum hevði verið við handli á uppgerðardegnum millum óvildugar partar, sum handla eftir vanligum handilsligum fortreytum.

Tá virðið verður mált, verður hædd tikin fyri øllum kendum marknaðarupplýsingum, sum kunnu metast at hava ávirkan á dagsvirðið, og sum luttakarar á marknaðinum væntast at taka við í prísásetingini av viðkomandi fíggjaramboði.

Um so er, at álítandi dagsvirði ikki kann ásetast fyri ónoteraðar kapitalpartar, verður virðið sett til kostprís.

### Kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum
Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum vera í fíggjarstøðuni hjá móðurfelagnum roknað eftir innara virði.

Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum verða roknaðir eftir innara virði. Hesin háttur viðførir, at kapitalpartar verða roknaðir eftir lutfalsliga virðinum av roknskaparliga innara virðinum hjá fyritøkuni, har lagt verður afturat fyri grundaðum, men ikki gjøgnumførdum uppskrivingum av fastari ogn og eftir eliminering av gjøgnumførdum, men ikki grundaðum uppskrivingum av fastari ogn, út frá sparikassans vanligu krøvum til avkast av íløgum í fasta ogn uppá 6,5-7,0%.

Úrslitapartar eftir skatt og eliminering verður tikið við í rakstrarroknskapin.

### Íløguognir
Íløguognir umfata fastar ognir, sum sparikassin eigur við tí endamáli at fáa leiguinntøkur og/ella kapitalvinning frá sølu.

Íløguognir verða settar til dagsvirði.

Dagsvirði fyri íløguognir verður sum høvuðsregla uppgjørt við støði í væntaða avkastinum av ognini eftir einum avkastprosenti, sum er einsæris ásett fyri ognina. Avkastprosentið er treytað av, hvar ognin liggur, slag av ogn, nýtslumøguleikum, innrætting og treytum í leigusáttmálum, og er sparikassans avkastkrav fyri íløguognir 6,5-7,0%.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Virðisjavnan verður bókað yvir rakstrarroknskapin í roknskaparpostinum kursjavnan.

### Fastognir til egna nýtslu (domicilognir)
Fastognir til egna nýtslu (domicilognir) eru ognir, sum sparikassin brúkar til egnan rakstur sum fyrisiting, deild ella aðrar tænastur. Ognin verður roknað sum domicilogn, um meginparturin av samlaðu gólvvíddini verður brúktur til sparikassans egna rakstur.

Domicilognir verða settar til endurmett virði frádrigið avskrivingar.

Domicilognir skulu í fyrsta umfari ásetast til kostprís og í aðru atløgu ásetast til endurmett virði, sum er dagsvirði á metingardagfestingini frádrigið eftirfylgjandi av- og niðurskrivingar.

Dagsvirðið fyri domicilognir verður sum meginregla ásett við støði í væntaða avkastinum og einum einsæris ásettum avkastprosenti. Sparikassans krav til avkastprosent fyri domicilognir er 6,5-7,0%.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Endurmetingar verða gjørdar soleiðis, at roknskaparliga virðið ikki víkir munandi frá dagsvirðinum á dagfestingini fyri fíggjarstøðuna.

Avskrivingar fyri domicilognir verða roknaðar eftir linjuháttinum yvir væntaðu nýtslutíðina við støði í endurmetta virðinum. Væntaða nýtslutíðin er 50 ár, svarandi til 2% p.a. Grundstykkir verða ikki avskrivaði.

Hækkingar í endurmetta virðinum á domicilognum verður beinleiðis ført yvir eginkapitalin, uttan so at hækkingin svarar til eina lækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin.

Fall í endurmetta virðinum á eini domicilogn verður tikið við í rakstrarroknskapin, uttan so at fallið svarar til eina hækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin. Í slíkum førum verður virðisfallið ført beinleiðis yvir eginkapitalin.

### Aðrar materiellar ognir

Aðrar materiellar ognir verða settar til kostprís frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður eftir linjuháttinum yvir væntaða nýtslutíð fyri ognina uppá millum 3 og 8 ár.

### Ognir, ið eru fyribils ogn

Ognir, ið eru fyribils ogn, umfata ognir, sum eru yvirtiknar frá kundamillumverandi, sum bert er ogn sparikassans fyribils, og har søla væntast innan stutta tíð, og har søla er sera sannlík.

Materiell støðisogn, sum er fyribils ogn, verður bókað til lægra virðið av roknskaparliga virðinum og dagsvirðinum frádrigið sølukostnað.

### Onnur ogn

Onnur ogn umfatar ognir, sum ikki kunnu setast undir aðrar ognarpostar. Posturin umfatar mest áogn av rentum og provisjónum og positivt marknaðarvirði av avleiddum fíggjaramboðum.

Avleidd fíggjaramboð verða roknað til dagsvirði, ímeðan aðrir postar verða roknaðir til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar undir ogn umfata goldnar kostnaðir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum.

Tíðaravmarkingar undir skuld umfata móttiknar provisjónir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum. Tíðaravmarkingar verða roknaðar til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Eftirsett kapitalinnskot

Eftirsett kapitalinnskot og hybridur kjarnukapitalur verður tikið við, tá skyldan er átikin og roknað sum móttikin upphædd, frádrigið kostnaðir í hesum sambandi.

Í seinni tíðarskeiðum verður eftirstillað kapitalinnskot roknað til amortiseraðan kostprís, svarandi til kapitaliseraða virðið roknað við grundarlagi í effektivu rentuni.

### Onnur skuld og onnur fíggjarlig ábyrgd

Onnur skuld fevnir serliga um skyldugar rentur og provisjónir, kostnaðir og negativt marknaðarvirði av avleiddum fíggjaramboðum.

Avleidd fíggjaramboð setast til dagsvirði, ímeðan aðrir postar setast til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Skattur

Aktuellar skattaskyldur og aktuell áogn av skatti verða í fíggjarstøðuni bókað sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku, javnað fyri skatt av skattligum úrsliti frá undanfarnum árum. Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í tíðarfráviki ímillum roknskaparlig og skattlig virði av ognum og skyldum.



Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í skattareglum og skattaásetingum, sum eru galdandi á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni.

Útsett skattaogn verður roknað sum tann upphæddin, sum væntast av vera brúkt, til dømis við javnan av skatti av framtíðar vinningi, ella við mótrokning í útsettum skattskyldum innan somu løgfrøðisligu skattaeind.

### Avsetingar til útreiðslur

Starvsfólkaskyldur, ábyrgdir og aðrar skyldur, har støðd ella gjaldsfreist eru ókend, verður tikið við, tá tað á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni er sannlíkt, at skyldan fer at kosta sparikassanum pening, og at upphæddin fyri skylduna kann gerast upp álítandi.

Skyldur roknast eftir bestu meting yvir teir kostnaðir, sum eru neyðugir fyri at innfría skyldina. Við útrokning av avsettum skyldum verður afturdiskontering gjørd, um tað hevur týdning.

### Uppskrivingarburturleggingar

Uppskrivingarburturleggingar umfata uppskrivingar av ognum í konsernini, eftir at útsettur skattur er tikin við. Upphæddin verður uppløyst, tá ognin verður niðurskrivað, seld ella gongur út.

### Statsábyrgd

Sparikassin er tilknýttur skipanini fyri statsábyrgd, sum er galdandi til 30. september 2010. Ábyrgdarprovisjónin verður tikin við í rakstrarroknskapin eftir linjuháttinum yvir ábyrgdartíðarskeiðið undir aðrar rakstrarútreiðslur. Sparikassans skyldur til rindan av møguligum tapum er ein avsett skylda, tá tað er sannlíkt, og kann hon uppgerast álítandi, verður hon roknað uppí rakstrarroknskapin undir niðurskrivingar uppá útlán og áogn v.m.

### Avleidd fíggjaramboð

Avleidd fíggjaramboð verða í fyrsta umfari tikin við í fíggjarstøðuna til kostprís og í øðrum umfari til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddum fíggjaramboðum innganga undir aðrar ognir, ávikavist aðrar skyldur. Dagsvirðið av avleiddum fíggjaramboðum verður uppgjørt við støði í marknararupplýsingum.

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjaramboðum, sum ikki hava støðu sum tryggingaramboð, verða tikin við undir virðisjavnan.

### Roknskaparlig trygd

Eingi fíggjaramboð lúka krøvini fyri trygging av dagsvirðinum av eini ogn ella skyldu. Tær serligu roknskaparligu ásetingarnar fyri tryggingaramboð verða tí ikki nýtt.

### Segmentupplýsingar

Av tí at virksemið og marknaðirnir ikki víkja frá innanhýsis, er í roknskapinum ikki upplýst um, hvussu netto rentu- og kostnaðarinntøkur og virðisjavnan er býtt uppá virkisøkir og á landafrøðiligar marknaðir.

Nota

3 **5 ára yvirlit**

| Lyklatøl | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 16,3 | 15,1 | 17,5 | 19,0 | 25,5 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,3 | 14,8 | 17,5 | 19,0 | 25,5 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | -17,3 | -20,1 | 9,4 | 10,6 | 10,6 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | -14,2 | -17,6 | 7,9 | 8,7 | 8,5 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 0,59 | 0,4 | 1,6 | 1,8 | 1,9 |
| Rentuváði | 2,0 | 1,4 | 0,5 | 1,7 | 1,8 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 1,2 | 0,2 | 0,1 | 0,2 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 100,2 | 94,9 | 108,1 | 111,5 | 92,9 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 102,4 | 156,9 | 66,5 | 27,6 | 156,8 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til eginpening | 84,1 | 85,6 | 52,4 | 68,6 | 35,9 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 2,2 | 0,7 | 0,6 | 0,1 | 0,0 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 3,1 | 2,6 | 1,0 | 1,3 | 1,9 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í árinum | 2,1 | 2,2 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlánsvøkstur í árinum | -1,1 | 1,6 | 21,6 | 35,5 | 14,4 |
| Útlán í mun til eginpening | 7,7 | 6,4 | 5,4 | 4,9 | 3,9 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 67.615 | 78.876 | 83.221 | 68.290 | 60.155 |
| Virðisjavnan | -6.299 | -16.168 | -2.089 | 1.298 | -686 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 485 | -17.845 | 130 | 463 | 499 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.707 | 1.126 | 2.082 | 2.391 | 827 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **63.508** | **45.989** | **83.344** | **72.442** | **60.795** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 58.737 | 56.110 | 52.255 | 39.452 | 32.016 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 4.571 | 7.966 | 2.550 | 1.382 | 981 |
| Tap og niðurskrivingar, skuldarar | 46.341 | 45.126 | -1.939 | 208 | -858 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-46.141** | **-63.213** | **30.478** | **31.400** | **28.656** |
| Skattur | -8.156 | -8.103 | 5.100 | 5.630 | 5.650 |
| **Ársúrslit** | **-37.985** | **-55.110** | **25.378** | **25.770** | **23.006** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.837.592 | 1.858.858 | 1.828.888 | 1.504.597 | 1.110.576 |
| Virðisbrøv | 245.083 | 229.884 | 259.639 | 153.357 | 176.986 |
| Innlán | 1.892.799 | 2.009.083 | 1.710.053 | 1.368.755 | 1.219.133 |
| Javni | 2.266.384 | 2.450.176 | 2.253.280 | 1.759.747 | 1.513.846 |
| Eginpeningur | 238.051 | 289.057 | 337.037 | 309.526 | 282.647 |

*Samanberingstøl eru ikki tillagað broytingum í nýttum roknskaparhátti fyri árini 2005-2008.*

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 4 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 4.109 | 4.478 |
| | Útlán | 126.885 | 142.028 |
| | Lánsbrøv | 6.530 | 6.947 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **137.524** | **153.453** |
| 5 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 2.330 | 12.021 |
| | Innlán | 71.151 | 75.290 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot í sambandi við Bankapakki II | 1.843 | 0 |
| | Ábyrgdarpeningur | 241 | 389 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **75.565** | **87.700** |
| 6 | **Kostnaðar- og provisjónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 0 | 0 |
| | Gjaldstænastur | 3.380 | 5.333 |
| | Lánisakskostnaður | 1.435 | 1.473 |
| | Provisjón av ábyrgdum | 1.705 | 5.409 |
| | **Tilsamans** | **6.520** | **12.215** |
| 7 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 1.804 | 971 |
| | Partabrøv | -4.868 | -16.694 |
| | Íløguognir | -3.297 | 0 |
| | Gjaldoyra | 62 | -445 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-6.299** | **-16.168** |
| 8 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | **Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn** | | |
| | Stjórn | 2.097 | 2.097 |
| | Nevnd | 600 | 600 |
| | Umboðsráð | 140 | 125 |
| | **Tilsamans** | **2.837** | **2.822** |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 17.432 | 17.841 |
| | Eftirløn | 2.819 | 3.051 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 1.791 | 1.814 |
| | **Tilsamans** | **22.042** | **22.706** |

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 8 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting (framhald)** | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 26.564 | 30.557 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **51.443** | **56.085** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 46,4 | 50,7 |

Sparikassin hevur ikki í roknskaparárinum veitt avriksløn ella bonus hvørki til nevnd, stjórn ella starvsfólk. Sparikassin hevur heldur ikki undanfarin ár veitt avriksløn ella bonus, og hevur heldur ongar ætlanir um framyvir at gera tað.

Vísandi til lóg um statsligt innskot í fíggjarstovnar § 8, stk. 9 hevur sparikassin í útroknan og uppgerð av skattskyldugu inntøkuni bert frádrigið helmingin av samsýningini til stjórnina, ella tkr. 1.048.

| | | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| | **Útreiðslur til grannskoðan** | | |
| | Samlað samsýning til tey umboðsráðsvaldu grannskoðaravirkini, ið fremja lógarkravdu grannskoðanina | 1.011 | 1.166 |
| | Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 250 | 474 |

Norðoya Sparikassi hevur ikki innanhýsis grannskoðan.

| | | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| 9 | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 771 | 1.214 |
| | Maskinur og innbúgv | 3.800 | 6.752 |
| | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **4.571** | **7.966** |
| 10 | **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 401 | 25 |
| | Provisjón til Det Private Beredskab vegna Bankapakka I | 6.893 | 0 |
| | **Aðrar rakstrarútreiðslur tilsamans** | **7.294** | **25** |
| 11 | **Niðurskrivingar uppá útlán v.m.** | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar uppá útlán við ársbyrjan | 35.657 | |
| | Niðurskrivingar uppá útlán í árinum | 59.169 | |
| | Afturførdar niðurskrivingar | 13.181 | |
| | Avskrivingar (endaligt tap) | 25.181 | |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar uppá útlán við ársenda** | **54.464** | |
| | Niðurskrivaði útlán íalt, áðrenn niðurskrivingar | 148.990 | |
| | Individuellar niðurskrivingar íalt | 54.464 | |
| | **Niðurskrivaði útlán íalt, eftir niðurskrivingar** | **94.526** | |



| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 11 | **Niðurskrivingar uppá útlán v.m. (framhald)** | | |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar uppá útlán við ársbyrjan | 5.247 | |
| | Niðurskrivingar uppá útlán í árinum | 1.439 | |
| | Afturførdar niðurskrivingar | 4.290 | |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar uppá útlán við ársenda** | **2.396** | |
| | **Burturleggingar uppá ábyrgdir** | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar uppá ábyrgdir við ársbyrjan | 17.000 | |
| | Burturleggingar uppá útlán í árinum | 1.560 | |
| | Afturførdar niðurskrivingar | 4.164 | |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | 13.000 | |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar uppá ábyrgdir við ársenda** | **1.396** | |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **58.256** | **55.551** |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | |
| | Niðurskrivingar og burturleggingar í árinum | 66.642 | |
| | Afturførdar niðurskrivingar og burturleggingar | 21.634 | |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -2.000 | |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 3.343 | |
| | Inngoldið til áður avskrivað krøv | -10 | |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin í árinum** | **46.341** | **45.126** |
| 12 | **Skattur** | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | -8.129 | -8.427 |
| | Broyting av útsettum skatti | -221 | 324 |
| | Javnan av roknaðum skatti | 194 | 0 |
| | **Tilsamans** | **-8.156** | **-8.103** |
| | Roknaður skattur | 18,00% | 18,00% |
| | Støðugt frávik - inntøkur og útreiðslur, ið ikki eru skattskyldugar | -0,80% | -3,75% |
| | Útsettur skattur | 0,48% | -0,68% |
| | Javnan av roknaðum skatti | -0,42% | 0,00% |
| | **Effektivt skattaprosent** | **17,25%** | **13,57%** |
| 13 | **Ogn hjá fíggjarstovnum og tjóðbankum** | | |
| | Uttan uppsøgn | 29.993 | 56.105 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 24.148 | 149.844 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **54.141** | **205.949** |

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 14 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 13.766 | 27.792 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 12.676 | 24.405 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 36.604 | 85.181 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 214.685 | 372.535 |
| | Yvir 5 ár | 1.559.861 | 1.348.945 |
| | **Útlán tilsamans** | **1.837.592** | **1.858.858** |
| 15 | **Lánsbrøv** | | |
| | Skrásett á keypsskálum | 203.113 | 174.482 |
| 16 | **Partabrøv** | | |
| | Skrásett á keypsskálum | 0 | 13.492 |
| | Onnur partabrøv | 41.971 | 41.910 |
| | **Partabrøv tilsamans** | **41.971** | **55.402** |
| 17 | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | Samlaðar keypsprísur við ársbyrjan | 2.461 | 0 |
| | Tilgongd | 0 | 3.076 |
| | **Samlaðar keypsprísur við ársbyrjan** | **2.461** | **3.076** |
| | Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 |
| | Úrslit av kapitalpartum | -1.474 | -615 |
| | Onnur tilgongd | 0 | 0 |
| | **Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársenda** | **1.474** | **-615** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **987** | **2.461** |

| | Úrslit<br>2008<br>1.000 DKK | Eginogn<br>31.12.08<br>1.000 DKK | | |
|---|---|---|---|---|
| **Assosieraðar fyritøkur** | | | | |
| **Partur av eginpeningi** | | | | |
| Sp/f KÍ-høllin | -177 | 1.974 | 50% | 50% |
| Sp/f Miðlon | -3.134 | 10.195 | 49% | 49% |
| Sp/f Ognarfelagið Saltangará | -151 | 4.645 | 49% | 49% |

Sp/f KÍ-høllin, fastognarfelag, eigur og rekur ítróttarhøll
Sp/f Miðlon, fastognarfelag, eigur og rekur handilsmiðstøð
Sp/f Ognarfelagið Saltangará, fastognarfelag, eigur og rekur handils- og skrivstovubygning

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 17 | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum (framhald)** | | |
| | **Millumverandi við assosieraðar fyritøkur** | | |
| | Áogn í lánistovnum og tjóðbankum | 0 | 0 |
| | Útlán | 61.850 | 61.270 |
| | **Ogn tilsamans** | **61.850** | **61.270** |
| | Skuld til lánistovnar | 0 | 0 |
| | Áogn í Norðoya Sparikassi | 70 | 605 |
| | **Skuld tilsamans** | **70** | **605** |
| 18 | **Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum** | | |
| | Samlaðar keypsprísur við ársbyrjan | 601 | 10.987 |
| | Frágongd | 0 | 500 |
| | **Samlaðar keypsprísur við ársbyrjan** | **601** | **10.487** |
| | Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 0 | 1.093 |
| | Úrslit av kapitalpartum | 485 | -17.231 |
| | Onnur tilgongd | 0 | 6.252 |
| | **Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársenda** | **485** | **-9.886** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **1.085** | **601** |

| | Úrslit<br>2008<br>1.000 DKK | Eginogn<br>31.12.08<br>1.000 DKK | | |
|---|---|---|---|---|
| **Tilknýttar fyritøkur** | | | | |
| Partur av eginpeningi | | | | |
| Sp/f Heim | -10.977 | 601 | 100% | 100% |

Sp/f Heim: Einki virksemi er í felagnum og ætlanin er at strika felagið í 2010.

| | | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| **Millumverandi við tilknýttum fyritøkum** | | | |
| Áogn í lánistovnum og tjóðbankum | | 0 | 0 |
| Útlán | | 0 | 0 |
| **Ogn tilsamans** | | **0** | **0** |
| Skuld til lánistovnar | | 0 | 0 |
| Áogn í Norðoya Sparikassi | | 444 | 15.143 |
| **Skuld tilsamans** | | **444** | **15.143** |

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 19 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | **Íløgurognir** | | |
| | Dagsvirði við ársbyrjan | 39.115 | 0 |
| | Tilgongd | 826 | 43.615 |
| | Frágongd | 17.000 | 0 |
| | Aðrar broytingar í árinum | -3.297 | -4.500 |
| | **Dagsvirði við ársenda** | **19.644** | **39.115** |
| | **Domicil ognir** | | |
| | Útveganarvirði við ársbyrjan | 18.433 | 12.791 |
| | Tilgongd | 4.255 | 6.858 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 |
| | Av- og niðurskrivingar í árinum | 214 | 214 |
| | Broytingar til endurmett virðir | -558 | -1.000 |
| | **Útveganarvirði við ársenda** | **21.916** | **18.433** |
| | **Bókað virði av føstum ognum við ársenda** | **41.560** | **57.548** |
| | Virðisáseting er gjørd av innanhýsis metingarfólki | | |
| | **Maskinur, innbúgv o.a.** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 40.450 | 20.408 |
| | Tilgongd | 416 | 20.042 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **40.866** | **40.450** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 18.652 | 11.900 |
| | Avskrivingar í árinum | 3.800 | 6.752 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 0 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **22.452** | **18.652** |
| | **Bókað virði av maskinum, innbúgv o.a. við ársenda** | **18.414** | **21.798** |
| | Yvirtiknar ognir, umflokkaðar | 0 | 5.741 |
| 20 | **Útsett skattaogn** | **16.202** | **8.599** |
| | Útsett skattáogn stavar mest frá skattaligum undirskoti | | |
| 21 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 1.083 | 3.732 |
| | Aðrar ognir | 839 | 15.893 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **1.922** | **19.625** |

| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 22 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | Skuld til tjóðbankar | 0 | 0 |
| | Skuld til peningastovnar | 65.000 | 119.866 |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar tilsamans** | **65.000** | **119.866** |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Upp til 3 mðr. | 65.000 | 119.866 |
| 23 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 552.377 | 714.336 |
| | Við uppsøgn | 662.586 | 582.748 |
| | Tíðarinnskot | 532.583 | 577.768 |
| | Serinnlán | 145.253 | 134.231 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.892.799** | **2.009.083** |
| | **Innlán eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Uttan uppsøgn | 923.638 | 714.336 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 282.238 | 381.908 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 535.379 | 738.280 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 64.620 | 93.038 |
| | Yvir 5 ár | 86.924 | 81.521 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.892.799** | **2.009.083** |
| 24 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | | |
| | Hybridur kjarnukapitalur frá danska statinum | 50.591 | 0 |
| | Kostnaður | 777 | 0 |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot við ársenda** | **49.814** | **0** |

Hybridur kjarnukapitalur verður rentaður við 10,7321% við møguleika til skiftandi rentuískoyti. Hann kann afturgjaldast í tíðarskeiðinum 10.09.2012 - 09.09.2014 til kurs pari, 10.09.2014 - 09.09.2015 til kurs 105 og eftir hetta til kurs 110.

| Nota | | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| 25 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 7.066 | 6.912 |
| | Broytingar, netto | -303 | 154 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **6.763** | **7.066** |
| 26 | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan** | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 0 | 138.594 |
| | Aðrar skyldir | 34.828 | 47.986 |
| | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan tilsamans** | **34.828** | **186.580** |

Sparikassin er partur av tveimum trætumálum. Annað um mótrokning í sambandi við eitt konkursbúgv og hitt í sambandi við eitt arbeiði, ið arbeiðstakari hevur gjørt fyri sparikassan. Sparikassin metir seg í hvørgum føri at eiga at gjalda. Men tað hvílir á sparikassanum ein ávísur processváði í hesum málum, um tey enda við at verða avgjørd á rættsligan hátt. Hesi mál eru bæði undir 1 mió. kr. hvørt.

Nota

27 **Ognir settar sum trygd**

Sparikassin hevur pr. 31. desember 2009 ikki veitt nakra ogn sum trygd.

28 **Ognarviðurskifti**

Norðoya Sparikassi er ábyrgdarsparikassi, og er ongin ánari av peningaogn ella avlopi sparikassans. Sparikassin hevur yvir 2000 ábyrgdarar, sum 4. hvørt ár velja eitt umboðsráð, ið telur 39 limir.

29 **Nærstandandi partar**

Nærstandandi partar hjá Norðoya Sparikassa eru:

Nevndar- og stjórnarlimir
Tilknýttar og assosieraðar fyritøkur

Allar avtalur millum nærstandandi partar og Norðoya Sparikassa eru gjørdar til marknaðartreytir.

Avtalur við nevndar- og stjórnarlimir umfata bert vanliga løn, meðan engagement við nevndar- og stjórnarlimir framganga av notu 30.

Avtalur við tilknýttar og assosieraðar fyritøkur umfata vanligan rakstur. Millumverandi við assosieraðar og tilknýttar fyritøkur framganga av notu 17 og 18.

| | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|
| 30 **Stjórn og nevnd** | | |
| Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans ella nærstandandi hjá hesum. | | |
| Stjórn, rentustig 5,75 % - 9,25 % | 3.021 | 2.913 |
| Nevnd íroknað starvsfólkavald, rentustig 5,75 % - 9,25 % | 3.462 | 3.940 |
| Tilhoyrandi trygdir | | |
| Stjórn | 3.280 | 3.090 |
| Nevnd | 5.828 | 7.061 |

Vísandi til kunngerð um fíggjarligar frágreiðingar frá kredittstovnum § 119, stk. 4, hevur sparikassin valt ikki at gera hesar upplýsingar upp fyri umboðsráðið.



| Nota | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 31 | **Kredittváðar- útlán býtt í vinnugreinir í %** | | |
| | **Almennir myndugleikar** | **0** | **0** |
| | **Vinnur** | | |
| | Fiskivinna | 5 | 5 |
| | Framleiðsluvinna | 3 | 5 |
| | Byggivinna | 4 | 4 |
| | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 10 | 10 |
| | Flutningur | 1 | 2 |
| | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna | 0 | 0 |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 10 | 10 |
| | Aðrar vinnur | 3 | 3 |
| | **Vinnur tilsamans** | **36** | **39** |
| | **Privat** | **64** | **61** |
| | **Tilsamans** | **100** | **100** |
| 32 | **Marknaðarváðar** | | |
| | **Gjaldoyraváði** | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 300 | 7.855 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 0 | 4.541 |
| | **Gjaldoyraábending** | **300** | **3.314** |
| | Gjaldoyraábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,1 | 1,2 |
| 33 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | 5.477 | 3.945 |

# NEVND OG STJÓRN

## Nevnd

**John Petur Danielsen,** deildarstjóri
Argir. Føddur 1949.
*(nevndarformaður)*
Innkomin í nevndina í 2009 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning: tkr. 91
Onnur leiðslustørv: einki

**Jóannes Hansen,** rektari
Toftir. Føddur 1955.
*(næstformaður)*
Innkomin í nevndina í 2007 og stendur fyri vali í 2010
Nevndarsamsýning: tkr. 73
Onnur leiðslustørv: einki

**Finn Kjølbro,** bókhaldari
Klaksvík. Føddur 1941.
Innkomin í nevndina í 1994 og stendur fyri vali í 2011
Nevndarsamsýning: tkr. 64
Onnur leiðslustørv: einki

**Erling Petersen,** bókhaldari
Klaksvík. Føddur 1956.
Innkomin í nevndina í 2000 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning: tkr. 55
Onnur leiðslustørv: JFK P/f, *nevndarlimur* og Atlantic Fishing P/f, *nevndarlimur*

**Jóhanna á Tjaldrafløtti,** skúlastjóri
Klaksvík. Fødd 1962.
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2011
Nevndarsamsýning:  tkr. 55
Onnur leiðslustørv: Lætt & Leskiligt Sp/f, *stjóri*

**Páll Klettskarð,** reiðari
Haraldssund. Føddur 1940.
Innkomin í nevndina í 1991 og stendur fyri vali í 2010
Nevndarsamsýning:  tkr. 55
Onnur leiðslustørv: Ólivant P/f, *nevndarlimur og stjóri*

**Julianna Thomsen,** vinnukundaráðgevi
Klaksvík. Fødd 1959.
Starvsfólkavald
Innkomin í nevndina í 2006 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning:  tkr. 55
Onnur leiðslustørv: einki

**Guðrið Lava Olsen,** vinnukundaráðgevi
Leirvík. Fødd 1962.
Starvsfólkavald
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning:  tkr. 55
Onnur leiðslustørv: einki

**Eyðun Nolsøe,** starvsfólkaleiðari
Klaksvík. Føddur 1957.
Starvsfólkavaldur
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning:  tkr. 55
Onnur leiðslustørv: einki

## Stjórn

**Marner Mortensen,** stjóri
Klaksvík. Føddur 1963.
Innkomin sum stjóri 12.03.2010
Onnur leiðslustørv: einki

# UMBOÐSRÁÐ

| | |
|---|---|
| ALEXANDUR JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| ÁLVUR KLAKK | FO-700 KLAKSVÍK |
| ANNA MARIA JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| ERLING PETERSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| FINN KJØLBRO | FO-700 KLAKSVÍK |
| FINNUR SIVERTSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HERGERÐ ZISKASON | FO-700 KLAKSVÍK |
| HILMAR KALSØ DANIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÓGVAN VÁGSHEYG | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÓHAN ANDRIAS REYÐBERG | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÓHANNA Á TJALDRAFLØTTI | FO-700 KLAKSVÍK |
| KALLI VÁÐKLETT | FO-700 KLAKSVÍK |
| KARL HERI JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| KJARTAN HANSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| MARKUS TUMMAS JACOBSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| NIKOLAS S. OLSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| NOEL JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| ÓLI MARNER CHRISTIANSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| OLIVUR THOMSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| SØREN ZISKA JACOBSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| TUMMAS J. LERVIG | FO-700 KLAKSVÍK |

| | |
|---|---|
| VICTOR NIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HANS PAULI PURKHÚS | FO-780 KUNOY |
| JÓGVAN JOENSEN | FO-798 TRØLLANES |
| ABSALON Í BUÐ | FO-740 HVANNASUND |
| HANS JACOB PETERSEN | FO-730 NORÐDEPIL |
| HANS JÁKUP KALLSBERG | FO-750 VIÐAREIÐI |
| J. SVERRI CHRISTIANSEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| JÓGVAN EDMUND Á GEILINI | FO-765 SVÍNOY |
| POUL J. ZACHARIASSEN | FO-740 HVANNASUND |
| BERGUR Á REYNATRØÐ | FO-620 RUNAVÍK |
| EYÐÁLVUR M. JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| JÓANNES HANSEN | FO-650 TOFTIR |
| JÓGVAN E. JOENSEN | FO-520 LEIRVÍK |
| MUNDA LANGAARD | FO-520 LEIRVÍK |
| PEDER T. HAAHR | FO-416 SIGNABØUR |
| SIGVARD JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| TORBEN NIELSEN | FO-625 GLYVRAR |
| TÓRBJØRN JACOBSEN | FO-625 GLYVRAR |


www.ns.fo
ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009 ÁRSFRÁSØGN 2009